Ár 2008, hin 27. november

113.
Afturkoma í býráðið

Hervið verður boðað frá, at Eyðgunn Samuelsen hevur boðað frá, at hon tekur sæti aftur í býráðnum frá 15. november at rokna.
Býráðsins samtykt: Staðfest.

114.
Tillagingar fíggjarætlan 2008

Málið varð fyrru ferð samtykt tann 23. september 2008, og verður nú aftur lagt fyri býráðið at samtykkja.
Býráðsins samtykt: Samtykt

115.
Fíggjarætlan 2009 – Býráðið
- við tilhoyrandi undirmálum:

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 27. november 2008 samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja fíggjarætl. við fylgjandi fortreytum.

Viðv. roknskaparskipan, sjálvsognarstovnar v.m.
Nevndin tekur undir við, at fleiri av undirstovnunum, sjálvsognarstovnunum v.m. verða tiknir við í kommunala roknskapin eftir nærri viðgerð í FíN á komandi fundi –
hetta sambært nýggju roknskaparkunngerðini. Nevndin tekur somuleiðis undir við, at fíggjarætlan, roknskapur v.n. verða sett upp samsvarandi nýggju roknskaparkunngerðini.

Samanumtiknar viðmerkingar til endaligu fíggjarætlan býráðsins fyri 2009.
Nevndin tekur undir við fyriliggjandi viðm. við hesum broytingum:

Atlantis:
Sí tilfari í málinum, har mælt verður til at gera ávísar flytingar av játtanum frá játtanini til Atlantis, sum varð varð samtykt á síðsta býráðsfundi.
Fíggjarnevndin mælir til fylgjandi:
Broytingin at flyta Kr. 150.000,- frá Atlantis til bókasavnið, ítrótt og kunningarstovuna – verður ikki gjørd.
Ístaðin verða Kr. 50.000,- fluttar frá játtanini til Atlantis til Kunningarstovuna. (08/00069 & 08/00044)

08/00153 – Ansingarskipanin – umskipan:
Víst verður til gongdina í málinum um ætlaðar sparingar innan barnaansingina, sum samtyktar vórðu á seinasta býráðsfundi, har niðurstøðan gjørdist, at málið verður byrjað av nýggjum.
Sosiala Deild hevur síðani havt nakað av samskifti við barnaansingarstovnarnar í kommununi har hesi hava umrøtt møguleikarnar fyri framtíðar skipan av skipanini.
Sí mál nr. 08/00153, har tað í skrivi frá sosialdeildarleiðaranum, dagfest 25/11-08, verður sett upp, hvørjir møguleikar lagt verður upp til.
Sosiala Nevnd hevur á fundi tann 26/11-08 samtykt at taka undir við ætlanunum, sum verða at arbeiða víðari við.
Nevndin tekur undir við SoN 26.11.2008.

Nevndarbýti/skipanin:
Nevndin heldur seg til samtykt býráðsins 4/11 um at leggja nevndirnar (SoN & MeN og TN & BBN) saman.

Dagtilhaldið:
Hildið verður fast um samtykt býráðsins 4/11 um inniloking av útbyggingini fyri 500 tkr.

Gamligarður:
Henda íløga er ikki við í fíggjarætlanini, men verður at taka upp sum serstakt mál.

08/00090 - KSF 2009:
Málið verið til kunning.

08/00149 – Ósáskúlaútbyggingin:
Nevndin tekur undir við meN 26/11-08, men játtanin verður skerd til 18 mkr.

Eldraheim á Viðareiði:
Sí skriv borgarstjórans, dagfest 19. september 2008, har skotið verður upp, at tilsøgnin sambært samtykt Klaksvíkar Býráðs um fíggjarliga luttøku til bygging av Ellisheimi á Viðareiði verður tikin aftur.
Sosiala Nevnd hevur á fundi tann 22/10-08 samtykt at taka undir við hesum.
Nevndin tekur undir við SoN 22/10-08.

2008-12-046 – Studio frá Pegasus – Virkishúsið:
Mentanarnevndin hevur á fundi tann 26/11-08 samtykt at mæla til, at tær Kr 25.000,- sum eru játtaðar úr 100-ára grunninum, ið ætlaðar vóru til fløguútgávu, kunnu nýtast til keyp av studioútgerð.
Nevndin tekur ikki støðu til, hvat anlegg/útgerð verður keypt – og frá hvørjum.
Nevndin tekur undir við MeN 26/11-08 & SoN 26/11-08.

08/00065 – Svimjihøllin – leigugjøld:
Mentanarnevndin tekur undir við upplegginum frá svimjihallarleiðaranum um broyttar prísir, sum fyriliggjandi fíggjarætlan eisini byggir á.
Nevndin tekur undir við MeN 26/11-08.

2006-19-073 Hølir – Kunningarstovan:
Mentanarnevndin hevur á fundi tann 26/11-08 samtykt, at miðað verður ímóti, at Heimavirkinum verður útvegað innivist í Leikalund, og at Kunningarstovan fer inn í Isenkram.
Nevndin tekur undur við MeN 26/11-08.

08/00151 – Leigugjøld til feløg v.m.:
Mentanarnevndin tekur undir við upplegginum frá umsitingini um broyttar prísir, sum fyriliggjandi fíggjarætlan eisini byggir á. Tó verður leigugjaldið til feløg í fimleikarhøllini ikki at hækka.
Nevndin tekur undir við MeN 26/11-08.

Viðv. sparitiltøkum – býráðsumsitingin:
Nevndin gjøgnumgekk øll svarskriv ó málinum til ætlanarskriv kommununnar.

Ziskatrøðskúlin:
Avsetingin til íløgur verður 0,5 mkr.

Aðrar íløgur, vegir o.a.:
Avsetingin til íløgur á hesum øki verður sett til 2,0 mkr.

Vísandi til omanfyristandandi mælir fíggjarnevndin býráðnum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2009, sum javnvigar við 130 mkr. í skattainntøkum, 90,199 mkr. í rakstrarútr., 8,25 mkr. í rentum, 10,0 mkr. í avdráttum, 21,0 mkr. í íløgum og 0,551 mkr. í avlopi.
Við nevndu fíggjarætlanini sum grundarlag mælir fíggjarnevndin býráðnum til at áseta kommunuskattin til 21,75% og barnafrádráttin til Kr. 4.000,-.

Býráðsins samtykt: Broytingaruppskot frá GvK um at nevndir býráðsins verða varðveittar, sum tær eru, og at tað verður fíggjað innan fyri kontubólk 6 við seinni flyting millum kontur varð samtykt við 5 atkv. fyri (EA,KFO,GvK,ASJ,RN) og 4 ímóti (SOJ, SVJ, EyS, KEZ).
Broytingaruppskot frá SVJ um at játta 50 tkr. til uppihaldspening Kalsoy av avlopinum varð samtykt við 9 atkv. fyri og 0 ímóti. GvK og ASJ atkvøddu ikki.
Við teimum samtyku broytingunum varð tilmælið frá FíN samtykt við 9 atkv. fyri, 1 ímóti (ASJ) og 1 atkv. ikki (GvK).